GJALDSTOVAN

# ÚTBJÓÐINGARSKRIV

Dekk og oljuskift til akfør hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum

# Innihald

1.0 Útboð – dekk og oljuskift til akfør hjá Almannastovuni o.ø. 3
1.1 Yvirskipað 3
2.0 Treytir 3
2.1 Yvirskipað 3
2.2 Longd av sáttmálaskeiði 3
2.3 Sáttmálatreytir 3
2.4 Innlatan av tilboði 4
3.0 Krøv 4
3.1 Mongd 4
3.2 Prísir 4
3.3 Krøv 4
4.0 Umsiting 5
4.1 Rokningar og upplýsing 5
4.2 Dalux 6
5.0 Tilgongdin at finna ein veitara 6
5.1 Samráðingar og sáttmáli 6
5.1 Fyrivarni og minstakrøv 6
5.2 Viðgerð av innkomnum tilboðum 7
5.3 Meting 7
5.5 Tillutan av sáttmála og endi á útboði 7

# 1.0 Útboð – dekk og oljuskift til akfør hjá Almannastovuni o.ø.

## 1.1 Yvirskipað

Gjaldstovan vil við hesari áheitan geva tykkum møguleikan at bjóða upp á at fáa rammusáttmála av dekk og oljuskift til akfør hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum

Útboðið verður framt sum eitt alment útboð sambært rundskrivi nr. 9000 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum. Tær formligu reglurnar í hesum útboði viðvíkjandi innlating av tilboði, samskifti millum útbjóðara og tilboðsgevara og aðrir upplýsingar eru at finna í hesum útbjóðingarskrivi.

# 2.0 Treytir

## 2.1 Yvirskipað

Almannaverkið eigur umleið 169 akfør, harav umleið 100 akfør eru fevnd av hesum útboði. Hesir bilar hava tørv á ymiskum viðlíkahaldi, harímillum olju- og dekkskift og verkstað.

Tað er í hesum sambandi, at Gjaldstovan ynskir at gera rammusáttmálar til dekk og oljuskift til akfør hjá Almannaverkinum og øðrum stovnum um teir hava áhuga at vera við.

## 2.2 Longd av sáttmálaskeiði

Keyp Landsins ynskir at gera trý ára sáttmála.

Veitarin og Gjaldstovan eru heimilað at siga hendan sáttmála upp við skrivligari fráboðan við eini freist á tríggjar mánaðir til sáttmálaenda seinast í einum mánaði. Er talan um týðandi mishald, kann sáttmálin sigast upp við styttri freist, í stendur mát við mishald.

## 2.3 Sáttmálatreytir

Við sáttmálanum bindur Keyp landsins Almannaverkið at fylgja ásetingum í rammusáttmálunum. Harumframt kann gerast aktuelt at lata aðrar stovnar taka lut í avtaluni. Tað verður gjørt við samráðing við vinnandi veitara.

**Meginreglur og undantøk**
Meginreglan er at øll akfør hjá Almannaverkinum í miðstaðarøkinum eru umfataði av útboðnum.

## 2.4 Innlatan av tilboði

Tilboð skal latast inn talgilt til Keypsportalin á fylgjandi teldupostadressu: keypsportal@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt. Freistin at lata inn tilboð er: fríggjadagin 21. august 2026 kl 12.

Tilboð, ið verða latin inn eftir hesa freist, verða ikki viðgjørd.

# 3.0 Krøv

## 3.1 Mongd

Almannaverkið átti við ársenda 2025 umleið 169 akfør. Umleið 100 av hesum akførum eru í meginøkinum og hava tørv á veitingum í útboðnum.

Við rammusáttmálanum við Gjaldstovan gera avtalu um:
- Keyp- og skift av olju
- Keyp- og skift av dekkum
- Verkstað
- Koyring til og frá verkstaði
- Dekkhotel

## 3.2 Prísir

Veitarin verður biðin um at upplýsa:

- Prís fyri keyp og skift av olju
- Prís fyri keyp og skift av dekkum
- Avsláttur fyri verkstað
- Prís fyri koyring til og frá verkstaði
- Prís fyri dekkhotel

Við í útboðnum er prísskjal, sum veitarin skal útfylla.

## 3.3 Krøv

### *3.3.1 Olja*

Veitarin skal skifta olju á akførum, um akfør hava koyrt yvir 5.000 km., ella um tað er 1 ár síðan, at olja er skift seinast. Oljan skal liva upp til fyridømi, sum víst verður til í handbók fyri hvørt einstakt akfar.

### *3.3.2 Dekk*

Veitarin skal skifta dekk fyri hvørt einstakt akfar tvær ferðir um árið. Hetta inniheldur eisini ásetan og balansering av dekkum v.m. Við hesum verður sipað til summar- og vetrardekk. Krøv til mynsturdýpd á summar- og 6

vetrardekkum sæst í kunngerð nr. 59 frá 5. mai 2021 um nýtslu av dekkum.

Veitarin skal tryggja, at góðskan á dekkunum livir upp til góðskuna á merkjunum Michelin, Goodyear og Continental ella líknandi. Við "ella líknandi" verður sipað til nýggj dekk frá øðrum merkjum enn teimum nevndu, men við somu stødd, slagi, brennievniskostnaði, vegtaki og dekkóljóði. Um veitarin bjóðar eitt annað merki verður ein meting gjørd av hesum merki, har tað m.a. verður hugt eftir hvussu tað klárar seg í testum.

Veitarin skal hava møguleika at burturbeina dekk, um dekk eru slitin og tískil ikki kunnu endurnýtast. Hetta skal vera íroknað prísinum fyri dekkskift.

Veitarin skal leggja seg eftir at skifta dekk og olju samstundis.

Veitarin verður biðin um at geva prís upp á dekkhotel til 90 dekk. Almannaverkið hevur í løtuni avtalu um hetta og skal kostnaðurin fyri flyting av hesum dekkum til nýggja dekkhotellið vera íroknað prísinum.

### *3.3.4 Verkstað*

Veitarin skal hava eitt tøkt verkstað til skift av olju og dekkum.

Keyparin skal vera VIP kundi soleiðis, at keyparin til eina og hvørja tíð hevur fremstu raðfesting.

Keyparin skal hava ein fast knýttan ábyrgdara, ið hevur ábyrgd av akførunum.

Meginreglan er at flestu bilar fara á verkstað har bilurin er keyptur, men veitarin skal bjóða seg fram til at gera verkstaðsarbeiðið, um eigarin ynskir tað.

### *3.3.5 Onnur krøv*

Veitarin skal hava møguleika at koyra akfør til og frá verkstaði, um bileigarin ynskir tað.

# 4.0 Umsiting

## 4.1 Rokningar og upplýsing

Stovnarnir og veitarin samskifta beinleiðis. Stovnar rinda sjálvir fyri síni keyp. Keyp landsins á Gjaldstovuni hjálpir fegin, um ivamál eru.

Upplýsingar um rammusáttmálar við prísi og treytum verður lagdar út á keypsportal.fo – har bert stovnar landsins hava atgongd.

Rokningin skal verða talgild, í vanligum oio-sml format. Veitarin, sum vinnur útboðið, bindur seg til at lata Keyp landsins upplýsingar um sølu hjá stovnum landsins, tá Keyp Landsins umbiður hesar.

Gjaldstovan hevur tørv á at fáa upplýst hvussu stór árlig sparing er í mun til vanligan listaprís. Hendan upplýsing

er ikki neyðug í sjálvum tilboðnum, men kann koma aftaná.

### 4.2 Dalux

Almannaverkið brúkar skipanina Dalux, har starvsfólk m.a. boða frá skaðum á akførum, umframt at skipanin goymir øll sýnsskjøl, skrásetingarskjøl o.a. fyri hvørt akfar. Tað er ein fyrimunur um veitarin er sinnaður at brúka hesa skipan, sum m.a. inniber, at samskifti og skaðafráboðanir fer gjøgnum Dalux.

## 5.0 Tilgongdin at finna ein veitara

### 5.1 Samráðingar og sáttmáli

Tað verður ein dómsnevnd við Almannaverkinum og Keyp landsins á Gjaldstovuni, sum tekur avgerð um rammusáttmáli verður gjørdur við veitara, sum letur tilboð inn.

Vit ætla ikki, at tað skal verða nakað samráðingarumfar. Útbjóðari kann tó venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tað vera sostatt ongar sáttmála- ella príssamráðingar í samband við hetta útboðið, og tískil verður heitt á tilboðsgevara um at fyrireika tilboðið soleiðis, at sáttmálin kann undirskrivast á tilboðsskjalinum, har allar treytir í útbjóðingartilfarinum eru við.

Øll krøv í útboðstilfarinum eru minstukrøv. Eitt minstakrav verður skilt sum eitt krav, ið treytaleyst skal lúkast.

### 5.1 Fyrivarni og minstakrøv

Tilboð, ið ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst, men tað verður tó sipað til, at útbjóðari kann venda sær til tilboðsgevarar við tí endamáli at neyvlýsa innihaldið í tilboðnum, og tá ið hetta ikki elvir til mismun í millum tilboðsgevarar.

Tilboðsgevari verður eggjaður til at seta skrivligar spurningar, um ivamál eru í samband við útfylling av fylgiskjølunum.

Tilboðsgevarar kunnu ikki hava skuld til tað almenna, vísandi til galdandi reglur.

Tilboð skal standa við 60 arbeiðsdagar roknað frá ásettu tilboðsfreist.

## 5.2 Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreyt.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing av avgerðini, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

## 5.3 Meting

Sáttmálin verður tillutaður í tráð við ásettu tillutanartreyt. Metingin av innkomnu tilboðum tekur støði í fylgjandi undir tillutanartreytum:

1. Prísur 100 %

Um Gjaldstovan metir, at ein veitari ikki gevur nóg góðan prís, eitt nú tí tað er ov stórur prísmunur millum veitararnar, so kann Gjaldstovan velja ikki at gera rammusáttmála við tann veitaran.

## 5.5 Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Sáttmálin verður tillutaður, tá ið útbjóðari hevur valt tilboðið.

Útbjóðari er ikki bundin til at taka av tilboðnum, sum hevur besta prís, og treytar sær rættin til at strika útboðið.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í samband við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari verður noyddur at strika útboðið.

| Virksemi | Dato, klokkutíð |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 4.1. | Mánadagin 31. august kl 12.00 |
| Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 5.1. | Fríggjadagin 07. september kl 12.00 |
| Væntandi tillutan av sáttmála | 21. september |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Hallur av Rana
Fulltrúi